

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 07 - 2013

# Norska andstøðan ætlar at býta oljugrunn sundur

Norska andstøðan, sum í løtuni tykist hava góðan møguleika at vinna komandi stórtingsvalið, ætlar at býta sundur risastóra oljugrunnin, um hon kemur til valdið. Tað skrivar Financial Times. Oljugrunnurin, sum er ogn hjá norska statinum, er heimsins størsti almenni íløgugrunnur við góðum 4000 milliardum kr. Hann eigur 1,25% av øllum virðisbrævaskrásettum fyritøkum í heiminum. Herfyri kunngjørdi grunnurin, at hann ætlar at hava ein meira virknan leiklut í teimum feløgum, har hann hevur týðandi partabrævalut og harvið kunna ávirka valið av stjórum og nevndarlimum. Fleiri serfrøðingar hava úttalað, at grunnurin í størri mun eigur at brúka sína stødd sína og longu íløgutíðina fyri at fáa meira burtur úr. Nú ætlar Jan Tore Sanner, næstformaður í Konservativa Flokkinum í Norra at seta eina serfrøðinganevnd, sum skal hyggja eftir bygnaðinum hjá grunninum og eftir fyrimunum og vansum, um man býtur grunnin sundur. Vit vilja hava eitt orðaskifti um, hvussu vit skipa grunnin og framtíðar bygnaðin. Skulu vit hava ein grunn ella kanska tveir grunnar, sigur Jan Tore Sanner sambært Financial Times. Ein møguleiki er sambært Sanner, at býta grunnin upp í ein part til partabrøv og ein til virðisbrøv ella tveir ymsar grunnar, sum kunnu kappast fyri at skapa meira gjøgnumskygni. Haraftrat er konservativi flokkurin eisini fyri at kjakast um at gera tað lættari hjá grunnininum at gera íløgur í annað enn partabrøv, virðisbrøv og ognir, sum grunnurin í dag er avmarkaður til.